FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 380 Hósdagur 7. desember 2006 15,-

## Bókin um Júst komin út
Vit vóru við til framløguna




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo


# “Føroyskt” flakavirkið opnað í Kina



Síða 20

Vit eru saman við Zakarias Wang í Kina at opna flakavirki við 2.000 arbeiðsfólkum.

# Í 100 ára føðingardegi hjá fiskimanni

Síða 12

Andrias hevur ikki verið nærri tjóðveldinum enn tað sama!






# Á stórhvalaveiði í Suðuríshavinum



Vit endurgeva forkunnugar dagbøkur frá ferðini við “Willem Barendsz” í 1946 við áhugaverdum myndum.

Síða 9


KÄRCHER



Vit eru einumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42


# Valevni leggur FF undir “illgrunasama valskipan”

Vit skjalprógva, at hetta er ágangur móti felagnum.

Síða 3

Dagbókin hjá Mikkjal Gulklett – 1. partur:

At taka úr blaðnum

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum**

# Á stórhvalaveiðu í Suðuríshavinum

Føroyingar hava altíð havt hug at royna fjarar leiðir. Hetta sæst m.a. á okkara royndum við stórhvalaveiðu í Suðuríshavinum. Í bók síni um Lopra og hvalastøðirnar har, greiðir Erling Poulsen - sum júst er farin - frá føroyskum royndum við hvalaveiðu á hesum leiðum fyrst í hini øldini.

Í summar høvdu vit eisini eina frásøgn um Thomas Jacobsen, ættaður av Skipanesi. Hann fór í 1913 til Suður Georgia at arbeiða á eini hvalastøð, og har hitti hann m.a. kenda pólgranskaran Sir Ernest Shackleton har hann arbeiddi umborð á skipi hansara "Endurance".

Tann 2. september í ár skipaði Miðvágs fornminnissavn fyri eini samkomu í sambandi við, at tað eru meira enn 60 ár liðin, síðani fleiri enn 62 føroyingar fóru á hvalaveiðu við hollendska hvalakókaranum "Willem Barendsz". Á samkomuni varð lisið úr dagbókum, og menn, sum høvdu verið við, greiddu frá. Á samkomuni var stórur áhugi sýndur hesum parti av okkara siglingarsøgu.

Flest allir av hesum monnunum arbeiddu umborð á "hvalakókaranum", meðan nakrir vóru umborð á teimum hvalabátunum, sum veiddu hvalin.

Tað er so heppið, at í hvussu er tveir mans hava skrivað dagbók frá hesum túrinum. Teir eru Mikkjal Gulklett í Nólsoy og Herlon Jacobsen (í Kálvalíð) í Miðvági. Vit hava fingið hendur á dagbókina hjá Mikkjali, og verður hon endurgivin í hesum og teimum báðum komandi bløðunum. Eisini ein partur av tí, sum Herlon skrivar er skoytt upp í dagbókina hjá Mikkjal, og hesi ískoyti eru tí skrivað við skráskrift.

Harafturat er tað so heppið, at Mikkjal hevði keypt sær eitt fototól og hevði tað við á túrinum.



*Mikkjal saman við síni familju í 1980. Aftara rað f.v. Per, Mikkjal, Hildibjørt, Eyðálvur. Frammanfyri: Marita, Katrin, Valborg og Mikala.*



NETHERLANDS WHALING COMPANY LIMITED

AMSTERDAM

CONTRACT-SEASON 1946/47

NETHERLANDS WHALING COMPANY, LIMITED, AMSTERDAM.

*Hetta er sáttmálin hjá Mikkjal. Her sæst, at hann er settur sum arbeiðarí á kókarínum, og at lønin er kr. 285 pr. mánaða. Afturat hesum er eitt bonus, sum er 1,86 norsk oyru p. tunnu av lýsi. Framleiðslan á ferðini var 80.000 føt, og hevur bonussið verið um kr. 1.500 fyri túrin.*

Hann tók ein hóp av myndum, og nógvar av teimum eru heilt góðar.

Fyrsti túrurin hjá Mikkjali, f. 9.9 1915, til skips var, tá hann sum bert 15 ára gamal fór við "Gracie" í 1930. Skipari var Jacob Nielsen - í Liða, ættaður úr Nólsoy og systkinabarn Mikkjals.

Onnur skip, hann sigldi við vóru:"Grundick" 1937-38 og 1954, "Emmanuel" 1939, "Silver Belle" 1940, "Lissie" 1945-46 og 1949, "Norðsteinur" 1947, Fossur 1948, "Elsa" , "Falkur" 1952, "Hertha" 1955, "Gustav Darendorf" og "Vón". Mikkjal fór í land í 1960.

Í 1943 leigaðu Mikkjal og aðrir nólsoyingar Miðstovuna Niðri á Bakka í Tórshavn frá D. E. Mohr, meðan teir arbeiddu hjá eingilskmonnum (hersetingarvaldinum). Húsaleigan var 100 kr. um mánaðin ella 5 kr. fyri hvønn av teimum 20 nólsoyingunum.

Mikkjal giftist tann 19. 06.1951 við Hildibjørt Jacobinu Katrin Debes úr Kollafirði, fødd 11.04. 1927.

Tey fingu børnini:
Eyðálvur 04.09.1951
Per 21.09.1952
Maritu 25.09.1956
Katrin 19.06.1958
Valborg 23.07.1060
Mikalu 24.01.1965.

Hildibjørt og Mikkjal fluttu út aftur til Nólsoyar við tveimum teimum yngstu børnunum, tá flakavirkið var sett á stovn í 1976. Har arbeiddi Mikkjal til 1986, tá hann var raktur av fleiri blóðtøppum og gjørdist avlamin.

Hann var heima hjá konuni í nøkur ár; men versnaði so við og við, til hann at enda var fluttur á Landssjúkrahúsið 5 mánaðir, áðrenn hann fór heim í teir ævigu bústaðir tann 11.10.1990.



*Martin Tórgarð var ein av føroysku manningini, og hann er eisini við í frásøgnini. Vit hava fingið fleiri myndir frá honum, og hann hevur hjálpt okkum at seta nøvn á myndirnar í greinarøðini.*

Vit hava eisini lænt myndir frá Martini Tórgarð, sum eisini var við henda túrin. Tískil kunnu vit prýða frásøgnina við nógvum frálíkum myndum. Martin hevur hjálpt okkum at seta tekst til myndirnar og at navngeva føroyingarnar, sum eru á teimum.

Samanlagt hava vit fingið eina frálíka frásøgn um hendan túrin og eitt ófført ískoyti til okkara siglingarsøgu.

Vit eru sera fegin um at kunna læna hetta tilfarið, og tað sæst, at Mikkjal er ein mentaður maður, og hann skrivar heilt reint føroyskt mál. Hann hevði nevniliga góðan lærara í føroyskum. Hesin var Símun Simonsen, ættaður av Brúnni í Norðragøtu.

Kona Mikkjal, Hildibjørt, greiðir frá, at tann dagin, hann og hinir nólsoyingarnir fóru avstað, var hon á veg til neytar. Tá hoyrdi hon Martin Tórgarð sita og spæla harmoniku, meðan teir stevndu út frá gomlu brúnni í Nólsoy. Hann sang:

*"Smil imens jeg*
*kysser dig farvel,*
*Hvert af dine kys*
*mig bringer held,*
*Bed for mig, min egen*
*dertil vi ses igen".*

Dagbókin

*Mánadagur 1. oktober 1946. Fóru frá Tórshavn við "Barjamu" kl 2 ½. Komu til Scrabster.*

2. oktober

*Allir fóru í land og búðu á flottum hotelli.*

3. oktober

*Fóru frá Scrabster kl. 9 við toki. Komu til Inverness og fingu døgverða*

*Framhald á næstu síðu*

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



*og so aftur í tok til London. Komu til London kl 10.00, fóru inn á eitt hotel. Tað regnaði.*

4. oktober
*Fóru frá London við toki til Harwich. Komu til Harwich um kvøldið, so umborð á fergun, sum fór til Hook van Holland. Og so við toki til Amsterdam.*

5. oktober
*Vit búgva á einum sjómansheimi. Í dag vóru vit í djóragarðinum.*

6. oktober
*...einki serligt í dag...*

7. oktober
*...einki serligt í dag...*

8. oktober
*...einki serligt í dag...*

9. oktober
*...einki serligt í dag...*

10. oktober
vóru 36 menn á kontórinum og ordnaðu passið og sjófartsbókina umframt finguravtrykk varð sett í passið og í eina serliga journal fyri reiðaríið.

Tá teir vóru lidnir við tað, vóru teir, sum skuldu við hvalabátunum, tiknir burtur úr og sendir til doktara fyri at taka eygu- og hoyriprøva. Nakrir norðmenn, sum búgva her saman við okkum, vóru eisini hjá doktara og á kontórinum.

11. oktober
fingu vit útbetalt pening fyri reisiútgiftir, vit høvdu goldið av okkara egna lumma. Merkiligt nokk vísti tað seg, at bygdarmenninir, sum komu langvegis frá, høvdu minni útgiftir enn havnarmenn.

Útgiftirnar hjá bygdarmonnum lógu frá 20 upp til 60 kr. Hjá havnarmonnum frá 80 upp til 150 kr. Klagað varð um, at vit fingu lítið og einki av kjøti. Tó tað var lovað okkum, at vit skuldu fáa nokk av tí. Tá kom fyri dagin, at hovmeistarin hevði selt ein stóran part av kjøtinum á svartabørs.

12. oktober
fingu vit bíløtini frá fotografinum, sum vit allir vóru uppi á. Hann bjóðaði sær at senda tey heim til Føroya til Louis Apol, sum so skuldi senda tey til sítt rætta pláss í Føroyum. Tey kostaðu 60 cent pr. stk. Eg keypti mær eitt fotografiapparat og tveir filmar frá Richard Nybo fyri ca. 55 danskar krónur.

13. oktober
Sunnudagin 13. oktober vóru vit í friði á sjómansheiminum. Tá fingu vit



*"Willem Barendsz" var bygdur sum oljutangaskip í Gøteborg í Svøríki í 1931. Støddin var 10.409 t. Longdin var 155 m, breiddin 20 m. og dýpdin 9,5m. Maskinorkan var 2 x2400 hk B&W. Skipið varð í 1945 keypt til Hollands og bygt um til hvalaskip. Sum tað sæst var forvitinskapurin stórur. Nógv fólk á bryggjuni.*



*Hetta var ein av hvalabátunum, sum var við á ferðini.*



*Ein stórhending á ferðini var tann sokallaði linjudópurin, tá farið varð um ekvator. Her gongur tað lívliga fyri seg!*



*Tað vóru fleiri nólsoyingar við. Her síggja vit Mikkjal t.v., ein hollendskan fotograf og Tórálv Poulsen.*

boð um, at vit allir skuldi møta upp umborð á "Willem Barendsz" kl. 7 morgunin eftir.

14. oktober
kl. 6 um morgunin vórðu vit vaktir. Kl. 6.30 fingu vit morgunmat. kl. 7 fóru vit við fergu yvir til dokkina, har kókaríið lá. Vit loystu skipið, og so varð tað sleipað út til eina boyu fyri at rætta kumpass. Tað vardi 3 tímar. Síðani var tað sleipað upp á síðuna á einum tangabáti at taka olju.

Nakrir mans mynstraðu umborð á "Willem Barendsz" sama dag. Vit skrivaðu okkara navn upp á bemandingslistan og fingu so eitt nummar - hvør maður - fyri at tað skuldi vera lættari at finna skil á øllum. Eg fekk nummar 145. Vit máttu eisini undirskriva "tavshedspligt" um alt sum gekk fyri seg umborð. Vit vóru umborð til kl. 3 um dagin, tá fóru vit í land aftur. Tá høvdu vit verið umborð í 9 tímar og hvørki fingið mat ella drekka, so fyrsti dagur umborð var einki serliga hugnaligur.

15. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu mjølsekkir og mjøltunnur og stúvaðu tað av.

Tað var ógvuliga lættligt at fáast við. Vit fóru í fergu bæði til og frá skipinum.

*Vit sóu nakrar damur, sum vóru útstillaðar í einum vindeyga, tær vóru horur.*

16. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu ymiskar vørur og útgerð. Meðan eg arbeiddi í lastini, var ein vestur stolin frá mær.

17. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu mjøl og aðra útgerð. Tá vit komu heim aftur á hotellið og høvdu etið nátturða, settu vit okkum inn í stovuna at spæla kort. Meðan vit sótu har, kom Richard Nybo og fortaldi, at ein tjóvur hevði brotið inn í kamar hansara og stolið ein jakka og tvinnar buksur umframt undirklæðir. Í jakkanum hevði hann pass, kontrakt og onnur pappír. Hann klagaði sína neyð fyri tí hægsta í hotellinum, men hann segði, at tað kom ikki sær við. Vit máttu sjálvir passa okkara klæðir. Richard fór so á politistøðina og fekk ein mann hagani at koma og hyggja at kamarinum. Hann slerdi upp á sjómansheiminum, at tann sum hevði tikið klæðini skuldi bera tey aftur frívilliga.

18. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu ymiskt arbeiði. Seinnapartin var skipið sleipað inn aftur til dokkina fyri at gerast liðugt.

19. oktober
fóru nakrir av okkum ikki til arbeiðis. Vit fóru á kontórið at fáa pengar. Tá vóru pengarnir sendir umborð á skipið. Vit fóru so umborð, men vit fingu ikki so nógv, sum vit vildu hava. Tað var lovað okkum, at vit skuldu fáa teir seinni. Tá vit fóru at eta nátturða, kom hovmeistarin og gav Richard Nybo hansara teknibók við passi og øllum pappínum í. Hann segði, at hon var komin í postkassan ½ tíma eftir at klæðini vóru stolin. Sama kvøld, sum klæðini vóru stolin, var ein blá troyggja stolin frá xx. Frá einum norðmanni vóru stolnar 50 danskar krónur.

20. oktober
Sunnudagin 20. oktober vóru vit í friði á sjómansheiminum. Sama dag vitjaðu 4000 menniskjur umborð á "Willem Barendsz" fyri at síggja skipið.

21. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu ymiskt. Tann dagin var ein troyggja stolin frá einum havnarmanni.

22. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu ymiskar vørur umborð harímillum medisin og aðrar apotekaravørur. Tvær flúgvimaskinur skulu vera við skipinum fyri at leita eftir skotnum hvalum og eisini at finna livandi hvalir. Onnur var tikin inn á afturdekkið seinnapartin. Dagin fyri var ein "journalistur" frá einum dagblaði umborð og fotograferaði skipið. Hann fotograferaði allar føroyingarnar upp á 2 bíløt saman við øðrum av manningini.

Prinsurin kom umborð

23. oktober
vóru vit umborð og lossaðu ymisk sløg av jarni, tunnur og gassfløskur. Ein lítil skjótgangandi bátur - av tí slagnum teir kalla fyri "rasari" - var tikin umborð í morgun. Tað vildi so illa til, at hann brotnaði, so hann má óivað koyrast í landi aftur. Vit skuldu í dag flyta flúgvimaskinina á dekkinum. Hon brotnaði undir halanum. Tað hjólið, hon rullar á, hevði gamalt brák á akslinum, og tað brotnaði. Í dag var prinsurin umborð og hugdi at skipinum.

Tað vóru minst 1.000 menniskjur umborð og hugdu at skipinum, so tað var næstan ikki arbeiðandi fyri fólki. Tey vóru altíð í vegin.

*Tað var grúiligt fólk umborð at síggja skipið. Prins Bernhard kom umborð.*

24. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu. Tann dagin var

*Framhald á síðu 15*

Framhald av síðu 10

stórt ball umborð av teirri orsøk, at tann dagin var skipið leyst frá bedingini og bleiv yvirtikið av reiðaríinum. Ein ministari var umborð tann dagin. Tá hann kom umborð, fór merki felagsins til tops. Tað var ein javnur streymur umborð av fólki at síggja skipið allan dagin. Tað mundu vera fleiri túsund fólk. Tað vóru so nógv, at tað var sjáldan arbeiðandi fyri teimum.

*Vit fóru umborð at búgva. Vit hava 3 læknar umborð og ein prest.*



1. Herlon Jacobsen (Kálvalíð), Miðvágur
2. Karstin Hansen (?)
3. Niels Midjord, Akrar ella Sumba
4. Hans Jákup (?), Miðvágur
5. Aksel Nielsen, Sumba
6. Dánial Johannes Mørk, Miðvágur
7. Mikkjal Danielsen (Gulklett), Nólsoy
8. Thomas Pauli Thomsen, Nólsoy
9. Tórálvur Poulsen, Nólsoy
10. Viljormur Joensen, Nólsoy (páp Ova)
11. Palli Frederiksen hjá Kunoyinginum, Miðv.
12. Henning Jacobsen, Miðvágur
13. Hilmar Petersen, Sandavágur
14. Juul Jacobsen, Nólsoy
15. Bjarki Skaale, Tórshavn
16. Anders Andersen, Strendur
17. Absalon Jensen, Tórshavn
18. Richard Nybo, Hestur
19. Hans Zachariasen, Hestur
20. Roald Hermansen, Hósvík
21. Óli Olsen, Argir
22. Martin Hentze, Sandur
23. Emil Lyngvej, Hestur
24. Niels Pauli Kjærbæk, Sumba
25. Poul (á Borð) Hansen, Tórshavn
26. Ludvig Jacobsen, Miðvágur
27. Óli Christian Jacobsen, Tórshavn
28. Johannes Heinesen, Múli
29. Marius Kamban, Tórshavn
30. Johan við Stein (Pollux), Tórshavn
31. Torbjørn Joensen, Tórshavn
32. Hans Jacob Hansen, Argir
33. Símun Pauli Lilaa, Lorvík
34. Poul Johs. Zachariasen, Sandur
35. Martin Tórgarð, Nólsoy
36. Hans Jacob Berg, Sandur
37. Sigurð Hentze, Skopun
38. Karl Hansen (Reynheim), Tórshavn
39. Aksel Petersen, Norðdepil
40. Juleif Jacobsen, Tórshavn
41. Magnus Sørensen, Dalur
42. Nikkel Jacobsen, Lorvík
43. Vilhelm Wilhelmsen, Tórshavn
44. Ejler Bærentsen, Tórshavn
45. Tórberg Gudmundsson, Tvøroyri
46. Johannes Poulsen (á Kák), Tórshavn
47. Hans Erling Guttesen (Abbi), Tórshavn
48. Napoleon Nolsøe, Vágur
49. Óli Bech, Dalur (sonur nr. 58)
50. Arnold Davidsen, Nes
51. Johs. Olsen, Sandur
52. Christian Mittún (Mattalág), Tórshavn
53. Róland Olsen, Kollafjørður
54. Henry Johansen, Vestmanna
56. Theodor Samuelsen, Tórshavn
57. Lars Davidsen, Vágur
58. Olivur Bech, Dalur
59. Abraham Joensen, Vestmanna
60. Napoleon Olsen, Hósvík
61. Johannes Eirikstoft, Tórshavn
62. Ebbe Mortensen, Tórshavn
63. Åge Hvidfeldt, Tvøroyri

25. oktober
arbeiddu vit umborð á "Willem Barendsz". Kl. 4 fingu vit boð um at fara í land eftir klæðunum. Kl. 6 fóru vit umborð. Kl. 7½ ótu vit døgurða umborð fyri fyrstu ferð. Tá vit fóru av sjómansheiminum, komu norðmenn aftur í staðin fyri okkum. Teir skuldu eisini við "Willem Barendsz". Tað stendur í hollendskum bløðum, at føroyingar heima eru illir um, at vit fara við til hvalaveiðu við "Willem Barendsz".

26. oktober
arbeiddu vit allan dagin fyri at gera skipið liðugt at fara avstað. Vit byrjaðu kl. 8 um morgunin og endaðu kl. 7 um kvøldið. Í dag kom ein flúgvimaskina umborð aftrat. Tá vit hildu uppat at arbeiða, komu hollendarar umborð at arbeiða. Teir arbeiddu alla náttina. Fleiri politistar ansaðu eftir teimum, meðan teir arbeiddu.

27. oktober
Sunnudagin 27. oktober kl. 9 um morgunin var loyst frá kaiuni og farið avstað. Tveir sleiparar vóru á framendanum og ein á afturendanum. Eitt politiorkestur spældi á kaiuni, tá skipið varð loyst. Brúgvarnar vóru svartar av fólki, har skipið kom framvið. Eitt ótal av bátum fylgdi skipinum avstað. Tað vóru nógv túsund menniskjur á fótum at síggja, at skipið fór avstað. Komnir nakað út um Amsterdam var lagt til eina brúgv í Imuiden, har vit tóku ammunitión inn. Tá vit vóru lidnir við ammuntiónina, fór sirenan at ýla. Tað var boð til fólkið um at koma til bátarnar beinan vegin og hava redningsbeltið hjá sær. Øllum fólkinum á skipinum varð sagt, hvønn bát, teir skuldu koma til, og hvat teir skuldu gera í bátinum. Henda fyrsta royndin við redningsbátunum fall ikki væl út, tí nógv fólk møtti ikki upp við bátarnar. Tað var gott veður men regnaði illa. Tá vit komu nakað longur út, komu vit inn í eina kanal. Vit máttu bíða ein hálvan tíma, áðrenn tað var pumpað so mikið at sjógvi inn í kanalina, at skipið kundi sigla víðari. Meðan vit lógu í kanalini, var øgiliga nógv av fólki og hugdi at skipinum. Kl. 6 um kvøldið sleptu sleipararnir skipinum, tá vóru vit væl leysir frá landið. Nú byrjaði ferðin hjá "Willem Barendsz".

*Sigldu frá Amsterdam kl 9.00. Tað var regn allan dagin. Vit steðgaðu í kanalini. Ein ógvulig rúgva av fólki og hugdi at og spældi eitt hornorkestur fyri okkum. Øll skip í havnini heilsaðu, tá vit silgdu til Southhampton eftir provianti. Eg fekk einar styvlar, ein frakka og einar skógvar.*

28. oktober
vóru vit vaktir kl. 7 um morgunin. Kl. 8 byrjaðu vit at arbeiða, og var tað arbeitt til kl. 9 um kvøldið. Tá var dekkið so toluliga ruddiligt. Vit sóu nógv skip suður gjøgnum kanalina. Meðan vit sigldu fram við Dover, sóu vit fleiri skipsvrak, sum lógu sokkin á botni við mastrum og kommandobrúgv upp undan.



*Her stuttleika teir sær óført. Her síggja vit f.v. 1. Torberg Gudmundsson, 4. Óli Olsen, Argir, nr. 5 Hans J. Poulsen, Miðvágur, nr. 7 Juul Jacobsen, Nólsoy, nr. 8 Richard Nybo, Hestur nr. 9 Emil Lyngvej, Hestur og við bakinum til Polluks, pápi Kára við Stein.*

Sóu "Queen Mary" og "Queen Elisabeth"

29. oktober
kl. 7 um morgunin vóru vit komnir inn til Southampton, har vit skuldu taka ymiska útgerð umborð. Kl. 9 kom loðsurin umborð og førdi skipið inn til eina kai. Skipið var væntað, tí lægtarar lógu klárir og bíðaðu, og arbeiðið byrjaði beinanvegin. Kl. 5 var hildið uppat at arbeiða. Teir menn, sum vildu hava pengar til at fara í land við, fingu 1½ pund.

30. oktober
arbeiddu vit ymiskt arbeiði umborð. Tá vit byrjaðu um morgunin, manglaðu 16 mans. Teir vóru eftir í landi og høvdu ongantíð verið umborð um náttina. Seinnapartin var onnur flúgvimaskinan útsett fyri at leita eftir einum hvalabáti, sum einki var frætt frá. Hon kom tó skjótt aftur og segði alt at vera í besta lagi. Fleiri føroyingar vóru og hugdu at "Queen Mary" sum liggur í eini dokk her í Southampton.

31. oktober
arbeiddu vit umborð. Tað var mest timbur, sum skuldi stúgvast og surrast fast. Um kvøldið var eg saman við fleiri øðrum av manningin og hugdi at "Queen Elisabeth", sum liggur við eina kai tætt við har, sum "Wilhelm Barendsz" liggur.

*…allur býurin er bombaður.*

1. november
var farið frá kaiuni og út á redina. Har var ankrað upp. Sagt var, at skipið skuldi bíða eftir hvalabátunum, sum skuldu koma til Southampton og síðani fylgjast við kókarínum suður eftir. Um kvøldið fingu vit eina bók, har í vit skuldu skriva upp teir tímar, vit arbeiddu yvirtíð.

Eg havi fingið 7 pakkar av cigarettum.

2. november
arbeiddu vit á dekkinum fyri at fáa tað ruddað, áðrenn vit skuldu sigla. Tað var givið uppat at arbeiða kl. 3 um dagin. Tað, sum eftir var at arbeiða, skuldi bíða til morgunin eftir. Um kvøldið fingu vit sápu til salg umborð umframt aðrar vørur.

*...eg fekk 10 sunlight sápur, 5 sápur til andlit, 1 skógvar, 10 pakkar av tyggigummi, 5 pk av cigarettum.*

3. november
Sunnudagin 3. november arbeiddu vit frá kl. 8 um morgunin til kl. 3 seinnapartin. Dekkið var ruddað, og tá tað var liðugt, var farið at sigla. 4 av hvalabátunum skuldu fylgjast við okkum. Um kvøldið vóru nógv telegramm send yvir Amsterdam til Føroyar. Vit fóru at sigla kl. 1.

*Regn allan dagin ...settu kós móti Cape Town í Afrika, eg sendi telegram heim kl 6.00. Vit fingu ein snaps.*

4. november
arbeiddu vit á dekkinum við ymiskt arbeiði. Tríggir hvalabátar sóust tætt hjá okkum. Tann fjórði sást ikki. Tað var stór og tung alda, men lítil vindur. Um kvøldið var kósin forandrað, tá kom aldan at vera meira til síðuna, og

Framhald á næstu síðu

skipið fór at rulla nakað.

*….eg fekk 1000 cigarettir, 8 plátur Cavendis, 5 pk svávulpinnar, 10 pk chokoladur, einar handskar.*

5. november
arbeiddu vit á dekkinum við at smyrja veirar og kveyla teir upp á afturdekkið. Kl. 5 um dagin møttu vit einum dampara, sum kom frá Suðuramerika. Hann hoyrdi til sama reiðarí sum "Willem Barendsz". Navnið á honum var "Ittersom". Kl. 12 í dag vóru vit mitt í Biskayabuktuni. Hin fjórði hvalabáturin kom ongantíð fram, so tað eru bert tríggir, sum fylgjast við kókarínum.

6. november
var arbeitt á dekkinum. Tað var mest spleysan av veirum og trossum sum gjørt var. Veðrið er av tí allarbesta.

*Arbeiddu við at spleysa weir. Hvalabátarnir tóku olju frá okkum. Eg tók eina tonn. Eru árakað Frankaríki. Fekk telegram við portugalsku strondina.*

7. november
var arbeitt á dekkinum allan dagin. Seinnapartin kom ein hvalabátur á borði at fáa sær nakað av provianti umborð. Nakað seinni kom ein annar at fáa sær eina tunnu av solarolju. Veðrið er stak gott. Á middegi vóru vit tvørs av Lissabon í Portugal.

8. november
var ymiskt arbeiði á dekkinum. Ein hvalabátur kom á borði seinnapartin at taka vatn og olju. Á middegi vóru vit tvørs av Spansk Marokko. Í dag var stilli og sól - ikki ov heitt.

9. november
var arbeitt á dekkinum til kl. 1. Tá fingu vit frí, tað sum var eftir av degnum. Ein hvalabátur kom aftur í dag at fáa sær vatn og olju. Skiparin á honum gramdi seg um, at hann og stýrimaðurin máttu gera alt arbeiði umborð, tí manningin var øll frá Hollandi. Teir dugdu bara at tosa hollendskt. Teir forstóðu hvørki norskt ella eingilskt.

10. november
Sunnudagin 10. november - tíðliga á morgni - sóu vit tær Kanarisku oyggjarnar. Teir tríggir hvalabátarnir, sum vóru eftir í Southampton, sigldu haggani frá hósmorgunin. Um kvøldið høvdu vit mist landið úr eygsjón. Um kvøldið var togtogan á dekkinum millum føroyingar og hollendarar. Føroyingarnir vunnu. Eisini var boksikampur millum hollendarar sínámillum. Ljósbíløt eru at síggja hvørt leygarkvøld í messuni.



*Hvør maður á dekkinum.*



*Her eru menn klárir at fara avstað. F.v. Jóhannes Danielsen, Havn, Martin Hentze, Sandur, Bjarki Skaale, Havn, Torbjørn Joensen, sonur Jóan J. skómakaran, Havn og Thomas Pauli Thomsen, Nólsoy.*

11. november
var arbeitt á dekkinum ymiskt arbeiði. Sólin skein og tað var øgiliga heitt. Segl vóru spent tvørtur um dekkið fyri at fáa nakað av lívd móti hitanum. Tá ið vit sigldu millum tær Kanarisku oyggjarnar í gjár, sóu vit ein stóran bý. Hann eitur Santa Cruz og liggur á oynni Tenerife.

12. november
var arbeitt á dekkinum uppá veirar og manilla. Tað var ikki so heitt sum dagin fyri. Tað er so almindiligt, tá ið arbeitt verður, at menninir ganga naknir yvir beltið fyri at tola hitan betur.

13. november
var sama arbeiði fyri á dekkinum. Ein hvalabátur kom í dag at fáa sær olju og vatn. Teir høvdu við sær tveir flúgvifiskar, sum vóru dotnir niður á dekkið hjá teim. Teir sóu út sum ein stór sild. Tað var bert tann munur, at teir høvdu veingir. Í dag frættist, at ein dampari úr sama reiðarí sum "Willem Barendsz", skuldi møta okkum og taka post heim frá okkum. Tað varð ikki so.

14. november
var arbeitt á dekkinum við sama lag. Fleiri av monnunum eru so illa sólbrendir, at teir fáa illa arbeitt. Kl. 7½ helt sekreterurin eitt møti í messuni um kontraktina. Teir tríggir hvalabátarnir, sum vóru eftir í Southampton, komu í dag til Las Palmas á teim Kanarisku oyggjunum.

15. november
varð arbeitt allan dagin á dekkinum við sama arbeiði sum dagarnar fyri. Um kvøldið fór at regna, og tað bleiv nakað væl av vindi. Toran fór at ganga, og alt havið var upplýst sum klárur dagur av toruljósum og veðurljósum. Um einar tveir tímar helt toran uppat, og tað var gott veður aftur.

16. november
var arbeitt til kl. 1 við ymiskt arbeiði. Um kvøldið sóu vit ljósbíløt úti á dekkinum. Meðan vit hugdu eftir ljósbíløtum fór at regna, so mátti tað flytast inn í messuna fyri at síggjast liðugt.

## Neptun kongur kemur umborð

17. november
Sunnudagin 17. november var allarbesta veður. Tað trongdi til, tí seinnapartin skuldu vit sigla tvørtur um linjuna, og tað vóru 128 fólk umborð, sum ikki høvdu siglt um linjuna fyrr. Kl. 2 kom Kong Neptun umborð. Hann sá gott út við krúnu á høvdinum við trýtindaðari hvísl í hondini. Skeggið rakk niður á øklar. Hann var fylgdur av havfrúgvum og havmonnum og hartil tríggir politistar. Teir skuldu taka sær av teimum, sum ikki vildu vera doyptir góðvilliga. Skiparin var og tók ímóti honum og fylgdi honum so fram á dekkið og hjálpti honum upp á trúnuna. Neptun helt so eina talu fyri børnunum, sum doypast skuldu. Tá hon var liðug byrjaði dópurin. Trý konufólk vóru við sum passaserar, tey vóru fyrst doypt. Áðrenn tey vóru doypt, vóru tey útsmurd við eini blanding av olju og sápu. So tók apotekarin og rakaði teimum við einum stórum brævkníví. Síðani vóru tey blakaði upp í eitt stórt kar fult av vatni og harí vóru tey doypt. Aftaná konufólkini vóru mannfólkini doypt á sama máta 4 og 5 á gangin. Tá ið doypingin var liðug, fingu øll tey doyptu dópsattest við tí nýggja navninum uppiá. Tað var óføra stuttligt at síggja. Tað var dúgliga fotograferað, meðan doypingin stóð uppá. Geologurin hevði sett eina línu út av reyvini á skipinum fyri at vita, um hann kundi fáa nakað fiskaskapilsi á. Línan var av klønum jarntráði. Kl. 11 fyri middag kom ein makrelur á. Hann vá 28 kg.

18. november
var arbeitt á dekkinum sum vanligt. Kl. 3 um morgunin í morgun sigldu vit um linjuna. Ein hvalabátur sigldi tætt fram við okkum í dag. Har var dópur umborð hjá teimum, tað sóu vit. Um kvøldið var ymiskur sportur á dekkinum. Kapprenning og at hoppa í posa. Tað var stuttligt at síggja.

19. november
var arbeitt á dekkinum - serliga við sverar manillatrossar at hava klárar at binda hvalabátar við, tá ið teir komu á borði at fáa sær vatn og olju og aðra útgerð. Tað frættist í dag, at hinir tríggir hvalabátarnir vóru komnir til Dakar í Senegal.

20. november
kl. 8 um morgunin komu hvalabátarnir á borði at fáa sær vatn og olju og alla ta útgerð, sum tørvar, fyri at teir kundu byrja at skjóta hval. Maskinan var steðgað, og so komu teir fyrst "Am 5". Síðani "Am 1" og síðst "Am 2", sum vóru nøvnini á hvalabátunum.

Teir vóru ikki lidnir fyrr enn kl. 7½ um kvøldið. Tá var aftur farið at sigla víðari. Meðan skipið lá stilt, var fult av haium (hávum) rundan um skipið. Hollendarar royndu at fiska teir. Teir fingu 7.

21. november
var ymiskt arbeiði gjørt á dekkinum. Til dømis spleysan av ymiskum veirum og at gera ketur til at binda um stertin á hvalinum, tá hann blívur hálaður upp á dekkið.

*…eg hevði føðingardag, roykti cigar. Vit eru nú á 4 st. S.b.*

22. november
var arbeitt við ymiskt arbeiði og eisini var arbeitt uppá at rudda dekkið fyri eplakassar og aðra útgerð, sum lá á dekkinum.

23. november
var arbeitt sama arbeiði sum vanligt til kl. 1 middag. Tá fingu vit fýraftan. Kl. 4 var boksikampur á dekkinum millum ein hollendara og Johan við Stein, Tórshavn. Johan var við yvirlutan. Síðan var togtogan millum 2 hold av føroyingum uppá 4 mans hvørt móti hollendarum. Bæði tey føroysku holdini vunnu. Johan fekk eina barbermaskinu í premiu. Hini bæði holdini 50 sigarettir pr. mann.

24. november
Sunnudagin 24. november var alt kvirt og friðarligt umborð. Um náttina var skipið vent aftur til ein hvalabát, sum lá við motorskaða. Hann var tikin upp á sleip, og so var ferðin fortsett.

25. november
var mesta arbeiði at rekja upp gamalt manilla til at beklæða veirarnar við, so teir ikki skuldu skamfílast. Skipið siglir 9 míl við einum hvalabáti upp á sleip. Veðrið er gott, men tað er kaldari nú, so nú fer eingin at sólbrennast meira.

26. november
var ymiskt arbeiði gjørt á dekkinum. Á middegi var báturin sleptur leysur, sum vit hava sleipað. Hann var í ordan og vísti seg at ganga væl. Vindurin vísur seg at vera vaksandi móti náttini.

27. november
var sama arbeiði gjørt á dekkinum sum vanligt. Tað var mest spleisan av veiri, ruddan av dekkinum og annað.

28. november
var arbeitt við sama lag á dekkinum. Vindurin veksur við sama lag.

29. november
var arbeitt ymiskt arbeiði á dekkinum. Tað vísir seg soleiðis, sum vindurin altíð er vaksandi móti kvøldið, men hann dettur burtur aftur móti morgni, og um dagarnar er altíð gott veður.

30. november
var arbeitt til kl. 1 um dagin. Tá eru hollendararnir vanir at hava "weekend", og tað er tað sama her umborð. Vit sóu ljósbíløt í kvøld, tey vóru góð.

1. desember
Sunnudagin 1. desember var veðrið av tí allarbesta. Ein hvalabátur fekk maskinskaða, men tað var skjótt, teir fingu hann í ordan aftur.

Dagbókin hjá Mikkjal Gulklett – 2. partur:

At taka úr blaðnum

Síðurnar 11, 12, 17 og 18 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum

# Nú byrjar hvalaveiðan

Í áhugaverdu dagbókini hjá Mikkjal Gulklett við ískoyti frá Herlon í Kálvalíð eru vit nú komin til Cape Town í Suðurafrika, har seinasta tilriggingin skal fara fram, og 17. desember verður fyrsti hvalurin skotin. Síðan gongur slag í slag við arbeiði og meira ella minni skemtiligum hendingum.

### Koma til Cape Town

**2. desember** byrjaðu vit at arbeiða sum vanligt kl. 8. Kl. 9½ løgdu vit til kai í Cape Town. Ein tíma aftaná komu bátarnir inn, sum høvdu fylgst við okkum. Teir tveir, sum høvdu verið í Afrika, lógu og bíðaðu eftir okkum. Tað var farið í holt við at fáa teimum útgerðina umborð beinan vegin. Teir vóru so gott sum lidnir, tá arbeiðistímin var úti. Allir menn fingu pening og loyvi at fara í land í dag.

**3. desember** var arbeitt við hvalabátarnar allan dagin. Tað var lítið gjørt, tí partur av fólkinum gekk og mól í landi.

**4. desember** var eisini arbeitt við hvalabátarnar. Tað var sama lagið sum dagin fyri.

**5. desember** var eisini arbeitt við hvalabátarnar. Í dag var alt fólkið aftur í arbeiði. Kl. 5 fóru tríggir bátar avstað at byrja skjótingina.

**6. desember** var arbeitt við at gera meira til av útgerð til hvalabátarnar. Kl. 1½ fóru eg og 2 aðrir føroyingar í land at gera ørindir. Vit fingu landgangspass frá stýrimanninum. Tað slapp eingin annar føroyingur í land uttan vit, tí vit høvdu arbeitt alla tíðina, men hinir høvdu gingið og malið í landi undir arbeiði. Kl. 6 sluppu tó allir, sum vildu, í land. Ein svenskari, sum var smiður, var eisini avkoyrdur fyri drekkarí. Nakrir nýggir menn komu umborð her í Cape Town.

**7. desember** var arbeitt allan dagin líka til kl. 5½ fyri at rudda dekkið so alt skuldi vera klárt, um onkur hvalabátur skuldi komið inn við hvali. Báðar flúgvimaskinurnar høvdu verið úti til øvilsir. Tá tær settu seg á sjógvin, kantaði onnur á og fór til botns. Manningin var bjargað, men ein maður doyði aftaná á hospitalinum í Cape Town. Tveir liggja skaddir á hospitalinum. Maskinan var upptikin og sleipað inn til lands at gera í stand aftur.

### Á kós í Suðuríshavið

**Sunnudagin 8. desember** var einki gjørt umborð. Savnað var inn nakað av peningi til ein krans til tann deyða flúgvaran. Hann kallaðis Leendert Kuiper. Kl. 8 í kvøld var farið avstað til Suðuríshavið. Ein hvalabátur fylgist við okkum.

**9. desember** var arbeitt allan dagin við at gera greiðir á dekkinum og dekkið sjálvt í stand til at taka móti hvali.

**10. december** var arbeitt við at gera dekkið í stand og at rudda upp í lastini. Veðrið er vánaligt. Nógvur vindur og stór alda.

*...fingu avísina. Her eru kappdúgvur at síggja, ein albatrossur, havhestar og ein pingvin...*

**11. december** var arbeitt sama arbeiði, bæði á dekkinum og í lastini. Veðrið er versnað. Tað er kalt við.

*...surraðu tað, íð leyst var, óveður, alt lá og furaði, fingu ávísir og sóu film um kvøldið...*

**12. december** kl. 8 var vakt sett. Alt fólkið var skift í helvt. Onnur helvtin skuldi arbeiða um dagin – 12 tímar, frá tí tann fyrsti hvalurin var komin á dekkið, og onnur helvtin um náttina eisini 12 tímar. Í dag var gott veður.

**13. december** var arbeitt allan dagin við at gera dekstólini til og at beklæðaleytarar við gomlum manilla fyri ikki at glíða, tá tey blivu útkleymd av lýsi. Í dag var gott veður men heldur kaldligt.

**14. december** var arbeitt til kl. 3 um dagin, tá fekk fólkið frí. Um kvøldið fekk hvalabáturin, sum fylgdist við okkum, motorskaða, og so var lagt stilt at bíða, meðan teir gjørdu hann í ordan aftur.

**15. december**, sunnudag, var gott veður. Kl. 5 um morgunin var maskinan í ordan aftur á hvalabátinum og so varð aftur farið at sigla. Í gjárkvøldið og í dag hava allir latið jóla- og nýttárstelegramm inn til telegrafistin, fyri at hann kundi senda tey til Føroyar tíðliga nokk til høgtíðina. Seinnapartin sóust nógv ísstykkir á vegnum hjá skipinum. Hvalabáturin royndi eftir hvali í dag, men tað bar ikki til at fáa nakran.

**16. december** byrjaðu vit sum vanligt at arbeiða kl. 8 um morgunin. Arbeiðið var mest at taða gamalt manilla upp til at beklæða við fyri skamfíl og at spleysa nakrar veirar. Kl. 12 var 12 tíma vakt sett. Vit tóku fyrstu dagvakt, náttarvaktin fekk frívakt. Kl. 8 um kvøldið var dagvaktin liðug. Tá loysti náttarvaktin av, teir skuldu vera uppi til kl. 8 morgunin eftir, tá áttu vit at loysa av aftur. Tað var ógvuliga kalt, og tað kavaði.

### Fyrsti hvalurin skotin

**17. december** var meiri smáligt við arbeiði á dekkinum. Kl. 7½ kom "Am 5" á borðið við einum finnhvali. Hann var heldur lítil. Kl. 8½ var hann komin á dekkið, og

Framhald á næstu síðu



Hjalmar Ingebrigtsen t.v. og Theodor Samuelsen vóru stýrimenn við hvør sínum hvalabáti.



Martin Tórgarð við harmoniku.



Manning søkist til hvalaveiðu

í Suðurhavinum

Við Willem Barendz Ekspeditión, Amsterdam, til komandi hvalaveiðutúr í Suðurhavinum ynskist henda manning: Til hvalabátar: stýrimenn, maskinistar, eldkyndarar og matrósar. — Til kókariið: flensarar, kókarar, lemmarar, skerarar og arbeiðarar.

Hýrir og prosentsatsir sum fyri norskar ekspeditiónir.

Fólk, ið hevur arbeitt við hvalastøðir og hevur sigið við hvalabátum, verður tikið framum.

Inntøkan fyri veiðutíðina 1945—46 hevur ligið um 5000 til 7000 kr. fyri kókariið, yvirtíð og prosentir froknað. Inntøkan hjá stýrimonnum og maskinistum liggur nakað væl hægri. — Túrurin varar um 7 mánaðir. Ekspeditiónin siglur úr Amsterdam í byrjanini av oktober og verður væntað aftur fyrrapartin í mai. Manningin fær fría ferð fram og aftur. Lønin kann verða goldin í føroyskum krónum ella, um tað verður ynskt, í sterling. — Familjan heima kann fáa útgjøld hvønn mánaða gjøgnum banka í Tórshavn.

Umsøkjandi mega sum skjótast venda sær til undirritaða.

L. W. Apol,

tlf. 385 & 390, skrivstova Landshandilsins.

Lýsingin eftir manning.



Her eru teir inni í Cape Town.



*Hvalabátur við nebbafiski.*



*f.v. Emil Lyngvej, Hestur, Dánjal J Mørk, Miðvágur, Juul Jacobsen, Nólsoy, Richard Nybo, Hestur og Johan Zachariassen, Hestur.*



*f.v. Jóhannes Heinesen, Múli, Johan við Stein, Havn, Henning Jacobsen, Miðvágur, Johannes Olsen, Sandur, Martin Tórgarð. Nólsoy, Bjarki Skaale, Havn og Óli Olsen, Argir.*



*Her síggja vit frá vinstru: Hans J Berg, Sandvík, Aksel Petersen, Norðdepil, Herlon Jacobsen, Miðvágur og Mikkjal Gulklett úr Nólsoy.*



*Hilmar Petersen, Sandavágur.*

tað var beinan vegin farið í holt við at skera hann upp. Skiparin skonkti snaps til hvønn mann, eftir sum tað var fyrsti hvalur, sum var komin á dekkið.

**18. december** var einki at gera fyrrapartin. Kl. 2 kom "Am 2" á borðið við einum bláhvali. Teir tóku olju og vatn, og brúktu hvalir sum fríholt millum skipið og hvalin. Tá teir vóru lidnir, tóku vit hvalin inn og fóru at skera hann sundur. Áðrenn vit vóru lidnir kom "Am 4" á borði við einum bláhvali, og eina løtu aftaná kom "Am. 3" við einum finnhvali. Kl. 8 fingu vit frívakt. Náttarvaktin hevur longu nú 4 hvalir at stríðast við, so teir fáa nokk av arbeiði.

**19. december** lá dekkið fult av hvali, tá vit komu til arbeiðis. Á afturdekkinum var so lítið at gera, at um vit skuldu halda varman, máttu vit fram í fordekkið at arbeiða uppá tvøstið.

Ein hósvíkingur var krøktur í lærið so mikið illa, at doktarin mátti skera sárið upp fyri at fáa reinsa tað. Tað vísir seg at vera væl av hvali nú, men arbeiðið gongur spakuliga, tí ketlarnir kóka so illani at byrja við.

**20. december** var arbeitt við sama lag. Alt strandar upp á ketlarnar. Teir eru nýggir og mugu hava eina tíð at kóka, áðrenn full kraft kann setast á teir. Í morgun skrædnaði ein veirur úr spikinum, meðan teir flensaðu. Spikstykkið reiv flensarin umkoll, og hann misti knívin soleiðis, at ein svenskari var skorin í hálsin. Tað bløddi nakað illa, men var ikki illani skorið. Seinnapartin datt ein ungur hollendari í ketilin. Hann meinslaðist nakað í høvdið og í hondina. "Am 5" hevur nú ligið hjá skipinum í tveir dagar við maskinskaða og við hvali upp á síðuna til fríholt.

**21. december** gekk arbeiðið við sama lag allan dagin. Seinnapartin kom "Am 4" á borði við einum hvali. Tá teir skuldu hanga hann upp í skipið, sakk hann. Teir høvdu tí betur ikki gjørt hann leysan, so teir pumpaðu bara meira luft inn í hann, so var tað klárað.

**Sunnudagin 22. december** arbeiddu vit allan dagin. Kl. 10 um morgunin fór "Am 5" avstað at skjóta aftur. Í dag vóru fleiri hvalir so rotnir, at tá spikið var skorið av teimum, var tvøst og kroppur tveitt fyri borð.

**23. december** kom ein maður til skaða. Hann kom fyri eina beinsag og var sagaður í andlitið. Tað var tó ikki farligt. Arbeiðið gongur ongan veg.

**24. december** var arbeiðið steðgað kl. 4½. Tá fingu vit frí til morgunin eftir kl. 8. Tíðliga um morgunin komu tveir hvalabátar "Am 1" og "Am 6" frá Cape Town. Teir høvdu nakað av posti við sær til útlendingarnar. Tveir hvalir vóru arbeiddir okkara vakt, tað var alt. Um kvøldið kl. 8 vóru vit bjóðaðir fram í messuna, har fingu vit pakka hvør maður í jólagávu. Pakkarnir vóru frá einum hollendskum kvinnufelag, sum sendir út jólagávur til allar hollendskar sjómenn og útlendingar í hollendskari sjótænastu.

**25. december,** fyrsti jóladagur, var arbeiðið byrjað sum vanligt kl. 8. Um náttina høvdu vit mist fýra hvalir, sum høvdu hingið aftaní skipinum. Veðrið var heldur ónossligt við kavaroki, men stilli. Seinnapartin var óveður, væl av vindi og ringur sjógvur, og tað gekk illa at taka hvalirnar inn av tí, at sjógvurin kom skolandi inn gjøgnum reyvina á skipinum. Tríggir mans komu til skaða í dag. Richard Nybo úr Heysti var skorin í hondina. Eitt stórt spikstykki, sum skuldi koyrast í pottin, slitnaði niður yvir tveir menn. Palle Frederiksen úr Sandavági fekk skaða í beinið og ein ungur hollendari misti vitið. Hann var tó frægari aftur um kvøldið. Ein ringur jóladagur fyri teir og ónossligur fyri okkum allar. Tá náttarvaktin hevði loyst av fóru Martin Tórgarð og stýrimaður Hendriksen at gera fast á ein hval fyri at taka hann inn. Tá kom eitt óløgið og skolaði teir báðar um koll. Teir blivu báðir stúkuvátir. Tað var ein heldur váttlig byrjan av arbeiðinum hjá teimum báðum. Arbeiðið gongur spakuliga av tí at tað er so ringt veður.

*Jóladøgverðin var lodnar hønur og brend suppa, ein øl og ein snaps...*

**26. december** var fínasta veður. Kl. 10 um morgunin kom kavarok og seinnapartin var ódnarveður. Tað vóru fáir hvalir at arbeiða í dag.

**27. december** var gott veður. Allir bátarnir fingu hval í dag, so tað stóð á at halda dekkið klárt í dag.

**28. december** var gott veður. Í dag kom ein hvalur, sum var 94 føtur langur. Tað er tann størsti sum enn er komin. Ein sandingur skar seg í beinið í dag. Tað var heldur illa skorið.

**Sunnudagin 29. december** var lítið at gera. Bátarnir fingu ongan hval. Á okkara vakt komu bert 3. Tað var gjørt ymiskt annað arbeiði.

**30. desember** var arbeitt upp á at klæða veirstroppar við manilla. Kl. 3 komu 4 hvalir og tað var okkara arbeiði fyri dagin.

**31. december** var arbeitt til kl. 4½ seinnapartin. Tá fingu vit frí eins og jólaaftan. Um kvøldið sóu vit ljósbíløt í messuni. Har var óføra stuttligt.

Nú koma vit til 1947

**1. januar** var arbeitt allan dagin bæði í døgurða- og kaffitíðini. Veðrið var av tí besta.

**2. januar** var nógv av arbeiði á dekkinum. Í dag fóru vit um teir fyrstu 100

*Framhald á síðu 12*

Framhald av síðu 12

hvalirnar. "Am 1" hevur fingið 8 hvalir, "Am 2" – 25 hvalir, "Am 3" – 26 hvalir, "Am 4" – 27 hvalir, "Am 5" – 14 hvalir, "Am 6" – 3 hvalir, tilsamans 103 hvalir.

**3. januar** var ónossligt at arbeiða á dekkinum. Tað var bæði vindur og kavarok og hartil kalt.

**4. januar** var nógv at gera á dekkinum. Um náttina var ein lemmari, t.v.s. ein sum limaði hvalirnar sundur, skorin í hondina. Tað var stórur skurður. Í dag skuldu vágamaðurin Palli Frederiksen leggjast inn á hospitalið umborð. Fótablaðið var knúst av spikstykkinum, hann fekk oman yvir seg. Tá teir skuldu skera eitt kjaftbein úr í dag, slitnaði krókurin úr veirinum, og beinið datt niður aftur. Tveir menn lógu undir, men hvørgin fekk skaða. Í dag var heilt gott veður.

**5. januar** var arbeitt sum vanligt á dekkinum. Veðrið var av tí besta. Timburmaður Poul Hansen úr Tórshavn datt oman í dag, soleiðis at knæið fór úr lið. Ein ringur sunnudagur fyri hann.

**6. januar** var einki gjørt fyrrapartin á afturdekkinum uttan at reinsa og spula tað. Seinnapartin var nógv av arbeiði. Veðrið er tað allar besta.

**7. januar** gekk arbeiðið sum vanligt. Tó var fleiri ferðir støðgir í vegna tess, at veirar og spøl gingu fyri. Veðrið er heilt gott.

**8. januar** var lítið gjørt á dekkinum av tí orsøk, at veirar slitnaðu og spøl brotnaðu. Veðrið er støðugt av tí besta. Ein afrikanari, sum er flensari, datt í dag og fekk skaða í armin.

**9. januar** var gott veður fyrrapartin, men seinnapartin bleiv bæði vindur og kavarok. Ein vágamaður Herlon Jacobsen datt í dag og fekk skaða í knæið. Tórolvur bleiv ringur í hálsinum og mátti fara í koyggjuna. "Am. 7" og "Am. 8" komu í dag kl. 4 frá Cape Town. Tá teir komu – "Am. 7" sleipaði "Am. 8" – slitnaðu tveir hvalir frá skipinum. "Am. 8" slepti "Am. 7" og fór eftir hvalunum. Hvørgin báturin var komin til skipið aftur, tá ið vaktarskiftið var kl. 8.

**10. januar** kl. 8 um morgunin kom "Am. 7" á borðið at fáa sær útgerð umborð. Vit vóru lidnir við hann kl. 4 um dagin. Tá kom "Am. 8" at borðið at fáa sær sína útgerð, hann var ikki liðugur okkara vakt. "Am. 7" fór frá, og vit tóku tann hvalin, hann hevði, uppá dekkið og flensaðu hann. Tað var tann einasti hvalurin, sum var arbeiddur á afturdekkinum okkara vakt í dag.



*Flogfar varð eisini nýtt til at leita eftir hvali.*



*Tað verður rokast á dekkinum. Her síggjast Palli Frederiksen, Miðvágur og Richard Nybo, Hestur.*

**11. januar** var reint dekk, tá vit komu upp um morgunin. Kl. 11 kom "Am. 4" við einum bláhvali. Tað var tann einasti hvalurin, sum var arbeiddur okkara vakt. Annars var arbeitt uppá at beklæða veirar og annað í dag. Í dag høvdu vit ein tíma til døgurða, og vit fingu frí kl. 7½.

**Sunnudagin 12. januar** fingu vit frí allan dagin. Dagin fyri var byrjað at sigla longur inn í ísin. Tað var siglt allan dag.

**13. januar** var siglt allan dagin. Einki var at gera. Veðrið var av tí besta. Vit sóu nógvan ís í dag, ongan í gjár.

**14. januar** var veðrið av tí allarbesta. Kl. 7 um morgunin kom "Am. 7" og "Am. 8" við hvør sínum fýra spermasethvalum og tóku hvør sín til fríholt, meðan teir tóku sær línurnar og aðra útgerð umborð. 3 aðrir hvalir komu í dag. Teir vóru allir tiknir inn á dekkið, og so var farið aftur at sigla longur inn í ísin.

### Aftur bláhvalur at fáa

**15. januar** byrjaðu vit aftur at fáa bláhval. Tað var øðrvísi at arbeiða teir enn spermasethvalirnar. Teir vóru sum leður at skera sundur.

**16. januar** gekk arbeiðið sum vanligt á dekkinum. Í dag koyrdu vit eisini tvøst í spikpottarnar av teirri orsøk, at tríggir pottar vóru brotnaðir á fordekkinum. Her, sum vit liggja, er nógvur ísur uttan um okkum. Ein stór grind hevur ligið og malið rundan um skipið allan dagin.

**17. januar** vóru fáir hvalir at beina fyri. Veðrið er av tí besta.

**18. januar** fingu vit bert tveir hvalir at arbeiða okkara vakt. Teir vóru lidnir kl. 3. Vit høvdu so einki at gera fyri enn kl. 6, tá kom ein bátur við trimum hvalum. Tað lukkaðist okkum at fáa ein av teimum lidnan, áðrenn vit fingu frívakt.

**Sunnudagin 19. januar** var arbeitt sum vanligt. Tað var nógvur vindur allan dagin. Tað sóust nógv stór ísstykkir í dag. Annars hevur tað bara verið smátt knas.

**20. januar** var gott veður. Arbeiðið var støðgað 3 tímar av teirri orsøk, at tann veirurin. sum hvalirnir hingu uppi í aftaní skipinum, var komin um skrúvuna. Tá hann at endanum var leysur, misti vit hvalin. Ein bátur kom tá við einum finnhvali. Hann tók hin hvalin, sum var slitnaður. Tað hevði verið missir í honum, tí hann var 90 føtur langur og hartil feitur. Tveir aðrir veirar slitnaðu undir arbeiðinum í dag, so vit vóru illa fyri at arbeiða í dag. Nú er komið upp um 200 hvalir. "Am.1" hevur fingið 23 hvalir. "Am.2" – 44. "Am. 3" – 53. "Am.4" – 49. "Am.5" – 22. "Am.6" – 27. "Am.8" – 1. Tilsamans 213 hvalir.

**21. januar** var arbeitt sum vanligt. Tað komu bert 4 hvalir á okkara vakt.

**22. januar** var bert ein hvalur til at arbeiða, tá vit fingu deksvakt. Síðani tá var lítið og einki gjørt á dekkinum. Dekkið var ruddað, og trossar gjørdir klárir til at binda tankbátin saman við "Willem Barendsz", tá ið hann kemur.

**23. januar** var einki at gera. Ein hvalur kom á dekkið, sum "Am.5" hevði havt til fríholt í tveir dagar. Hann var kavrotin.

**24. januar** kom fleiri hvalir, so tað var nokk av arbeiði allan dagin. Tíðliga um morgunin kom tankbáturin frá Cape Town. Hann hevði 18 mans við sær til "Willem Barendsz". Hann hevði eisini post við til hollendararnar.

**25. januar** var farið at sigla longur inn í ísin. Tankbáturin "Nacella" fylgdi við okkum. Seinnapartin var støðgað. "Am.7" kom við trimum spermum. Teir vóru hongdir til fríholt millum skipini. Tað var byrjað beinan vegin at pumpa oljuna umborð.



*Ísfjøll vóru eisini á leiðini.*



*Her ein rættiligur fongur klárur at hiva inn á hekkuna.*



*Ein rættiligur stórhvalur er innkomin og nú verður farið at flensa.*

Framhald á næstu síðu


*Hvalabáturin "AM 2".*


*Ein royður fyllir væl upp á dekkinum.*


*Hekkan á "Willem Barendsz".*


*Býráðshøllin í Haarlem í Hollandi er skrýdd við lutum úr hvalabeini.*

**26. januar** var arbeitt allan dagin við at lossa ymiska útgerð umborð á "Willem Barendsz". Veðrið var av tí allarbesta. So langt, sum eygað sá, var ísur uttan um okkum. Tað var alt smáur ísur, einkult stór stykkir.

**27. januar** var arbeitt við sama lag. Í gjár fór Palle Frederiksen umborð á tangabátin. Hann skal heim við honum til Hollands. Ein hollendari fór umborð samtíðis. Hann hevði eisini skaða í beininum. Fimm menn fóru umborð á tangabátin fyri at reinsa tangarnar og gera teir klárar at koyra olju í. Kl. 10 um kvøldið fór tangabáturin frá "Willem Barendsz" til næstu havn at leggja seg har, til hann var klárur at sigla heim aftur.

**28. januar** var nógv at gera allan dagin. Vit arbeiddu fimm hvalir á okkara vakt. Teir kláraðu ikki at taka frá frammi á hinum dekkinum.

**29. januar** var arbeitt sum vanligt til kaffitíð. Tá var eingin hvalur eftir. Kl. 3½ kom "Am.6" á borði við maskinmeistaranum. Hann var komin til skaða av umstýringini. Hann hevði bløtt illa út gjøgnum oyra. Hvussu hann fer at klára seg er ivingarsamt. Hann hevði mist vitið og var ikki raknaður við aftur okkara vakt. Kl. 2 fóru vit at sigla út úr ísinum. Tað er nógvur vindur og hartil kalt.

**30. januar** var arbeitt við at gera ymiskan reiðskap til á dekkinum. Kl. 4 kom ein bláhvalur, og hann arbeiddu vit lidnan, til vit fingu frívakt. Tað hevur verið óveður í dag.

**31. januar** var arbeitt við at spleysa veirar til at binda hval við til skipið, og vit fóru at bera harpunur upp á dekkið til at koyra umborð á bátarnar, tá teir komu aftur at bunkra. Tað var farið at sigla inn aftur í ísin í dag.

**1. februar** var lítið arbeitt. Um morgunin kom ein stórur bláhvalur. Hann vardi til middag. Síðani kom ein spermur. Hann tók tað, sum var eftir av degnum.

**2. februar** var sunnudagur. Tá var nógv at gera allan dagin. Tað kom hvalur eftir hval allan dagin. Veðrið var av tí allarbesta. Í dag kom tangabáturin aftur til skipið. Hann hevði verið við olju til eitt annað kókarí. Eitt russiskt kókarí var tætt hjá okkum í dag.

**3. februar** var nógv av arbeiði allan dagin. Tað eru fleiri hvalir aftur út í dag. Tað kom ein bátur frá tangabátinum í dag eftir doktara til ein sjúkan mann. Teir høvdu umborð. Veðrið er av tí besta.

**4. februar** var nógv arbeiði allan dagin. Tað russiska kókaríið var tríggjar fjórðingar frá okkum í dag. Tann fyrsta dagin teir royndu her suðuri, fingu teir 15 hvalir. Tað var ein góður dagur fyri teir.

4. februar fóru vit upp um 300 hvalir. "Am.1" – 39 hvalir, "Am.2" – 51, "Am.3" – 71, "Am.4" – 69, "Am.5" – 33, "Am.6" – 27, "Am.7" – 3, "Am.8" – 10, tilsamans 303 hvalir. "Am.7" er boyubátur. Hansara arbeiði er at taka hval frá hinum bátunum og sleipa teir til skipið og at vera til reiðar, um skipið skuldi trongt til hann. Arbeiðsmaðurin hjá okkum á reisuni frá Amsterdam til Íshavið, ein norðmaður, sum kallaðist Hansen, er í dag koyrdur umborð á tangabátin við pakk og sek. Orsøkin er tann, at maðurin var ómøguligur og óbrúkiligur og brúkti altíð kjaft móti sínum yvirmonnum.

**5. februar** var lítið gjørt, tó at fleiri hvalir hingu aftan í skipinum. Tað kom av, at teir tóku ein stóran bláhval upp, og sveivurin slitnaði av honum. Tað gingu fleiri tímar, áðrenn teir fingu hann upp á dekkið. Teir máttu seta 3 veirar á hann. Hann var 90 føtur langur og øðiliga feitur.

**6. februar** var arbeitt sum vanligt á dekkinum. Veðrið er av tí besta.

**7. februar** var ikki nógv av arbeiði. Vit fyltu tveir pottar á afturdekkinum. Síðani tóku vit tríggjar spermar upp og flensaðu teir, skóru høvdini av og koyrdu restina yvirborð. Tá vit fingu frívakt var reint dekk.

**8. februar** var nógv av arbeiði allan dagin. Vit lógu allan dagin undir einum ísstykki, sum kundi vera ein hálvan fjórðing til longdar og púra slætt omaná. Tað átti at vera einar 200 favnar høgt.

**Sunnudagin 9. februar** var nógv av arbeiði allan dagin. Veðrið er av tí besta.

**10. februar** gekk arbeiðið heldur seint á afturdekkinum allan dagin av teirri orsøk, at tað vóru flensaðir so nógvir hvalir, at teir kláraðu ikki at taka undan á fordekkinum.

**11. februar** gekk arbeiðið sum vanligt allan dagin. Tíðliga um morgunin kom tangabáturin á borðið, og tað var beinan vegin byrjað at pumpa hvalaolju umborð í hann. Í gjár kom "Am.3" á borðið við maskinskaða. "Am.7" liggur tætt hjá skipinum við 10 hvalum uppi í sær, sum hann hevur tikið frá hinum bátunum.

**12. februar** var arbeitt til kl. 12. Tá fingu vit frívakt til kl. 8. Tá skuldu vit taka vakt aftur til kl. 8 morgunin eftir. Orsøkin var tann, at vit skuldu skifta yvir frá dagvakt til náttarvakt.

**13. februar** høvdu vit okkara fyrstu náttarvakt. Veðrið var av tí besta, og væl gekk at arbeiða, tó at tað ikki fall so væl fyri sum um dagin, tí vit máttu brúka lummalykt at lýsa við, meðan vit arbeiddu við pottarnar.

**14. februar** var nógv av arbeiði alla náttina. Vit fyltu 10 pottar á okkara vakt. Um dagin var ein hvalur tikin upp, sum var 92 føtur langur og hartil feitur.

**15. februar** var arbeitt sum vanligt alla náttina. Tað sóust nógv stór ísstykkir uttan um skipið. Veðrið var av tí allarbesta. Klár luft og stilli.

**16. februar** gekk arbeiðið spakuliga alla náttina. Fyri tað fyrsta vóru eingir pottar tómir, og tá ið teir til endan vóru tómir, var einki spik at koyra í teir. Vit fyltu tó upp í 9 pottar. Eftir sum arbeiðið gekk var tað nógv.

**17. februar** var nógv av arbeiði alla náttina. Tað var mest finnhvalir, sum vit arbeiddu. Teir eru væl feitari nú enn fyrsta vit byrjaðu at skjóta teir.

**18. februar** var arbeitt sum vanligt alla náttina. Nú eru vit komnir upp um 400 hvalir. "Am.1" hevur fingið 52, "Am.2" – 65, "Am.3" – 92, "Am.4" – 92, "Am.5" – 47, "Am.6" – 44, "Am.7" – 8, "Am.8" – 21, tilsamans 421 hvalir.


*Royður, ella bláhvalur, var týdningarmesti fongurin hjá hvalaveiðumonnunum.*


*Nebbafiskur varð eisini veiddur.*

Síða 23

FF bláðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 382 Hósdagur 11. januar 2007 15,-



# Av "Atlantic Navigator" út á Stóru Dímun





P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo




Síða 4

# Landsfundurin 2006

Vit hava nógv tilfar frá landsfundinum.



## Hvalaveiðan í Suðuríshavinum

Hesa ferð hava vit 3. og seinasta part av søguni um stórhvalaveiðu í Suðuríshavinum fyri 60 árum síðani.

Síða 9

# Vinnan í Gøtu 20 ár

Eftir eina trupla byrjan fyri 20 árum síðani, hevur gingið betur enn nakar hevði droymt um.

Síða 12

## Frágreiðingin hjá Menakhem

Vit hava 2. part av frágreiðingini um fiskiveiðuna undir Føroyum.

Síða 20





KÄRCHER
Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

Dagbókin hjá Mikkjal Gulklett – 3. partur:

At taka úr blaðnum
Síðurnar 9, 10, 15 og 16 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum

# Túrurin endar og komið verður aftur til Nólsoyar

Nú hava vit 3. og seinasta part av forvitnisligu dagbókini hjá Mikkjal Gulklett í Nólsoy, tá hann saman við 60 øðrum føroyingum var á hvalaveiðu á Suðuríshavinum. Nú fer at líða túrinum nakað, og so verður farið at sigla heim. Hetta er nú eisini ein longri túrur, men 3. juni er teir heima aftur í Føroyum eftir at hava verið burtur síðan 1. oktober. Teir hava tískil verið burtur í 8 mánaðir. Martin Tórgarð minnist seg hava fingið eitt bræv alla hesa tíðina, og tað fekk hann í februar.

Vit halda áfram við dagbókini.



*Shilling 1945*
*Millum avlopsmyntirnar, ið Mikkjal Gulklett kom heim aftur við frá túrinum við Willem Barendsz, var hesin suðurafrikanski skillingurin í silvuri frá 1945. Fyri savnarar er hetta árstalið heldur sjáldsamt. Mynturin hevur nú í meira enn tredivu ár verið í sínum "rætta" umhvørvi: í stóra mynta- og seðlasavninum hjá soninum, Eyðálvi Gulklett.*



*Frá vinstru, Theodor Samuelsen og Absalon Jensen.*
*Søgan aftanfyri hesa myndina er nokkso áhugaverd. Í september 1948 fær Theodor Samuelsen, seinni kendur sum kongiligur loðsur, eitt bræv frá einum av hollendsku manningini Hente van der Lee. Hann er læknalesandi og skrivar heilt væl norskt. Hann letur sera væl at føroyingunum hann hevur verið saman við og letur heilsa fleiri teirra, m.a. Pollux, Villa, Nikkel og Absalon. Serliga letur hann heilsa Juleiv Jacobsen úr Havn, sum enn er á lívi.*
*Hann greiðir frá, at hann er blivin narraður av gentuni. Men tað er kanka líka frægt ikki at vera forlovaður, tá ein hevur 5 ár eftir at lesa!*
*Hesir tríggir hava verið einum hvalabátinum "AM 6".*

Fingu eina pingvin

**24. februar** var lítið at gera. Tveir hvalir vóru arbeiddir á okkara vakt. Tá teir vóru lidnir, tóku vit ein sperm og ein finnhval inn á dekkið. Teir høvdu vit havt til fríholt í 14 dagar. Síðani var farið at sigla inn í ísin aftur fyri at gera tangabátin kláran frá "Willem Barendsz", so hann kundi fara heim við oljuni. Tá vit høvdu siglt nakað, kom ein bátur upp á síðuna við maskinskaða. Ferðin var støðgað, fríholtini koyrd fyri borð aftur, og so komu bátarnir so við og við á borði við hvali aftur. Meðan dagvaktin arbeiddi við at flensa ein hval, kom ein pingvin gangandi upp á dekkið gjøgnum hvalakjaftin afturi í reyv. Hon var fangað og sett í búr uppi á flúgvidekkinum.

**25. februar** var arbeitt allan dagin við sama lagi sum vanligt. Veðrið er av tí besta.

**26. februar** var besta veður, sum kann fáast á sjónum. Stilli og sól og av klárasta sýni. Einar 5 fjórðingar frá okkum sóu vit eitt fremmant hvalakókarí. Allir bátarnir komu á borði við hvali. Summir við tveimum, so vit høvdu ov mikið av arbeiði alla náttina ígjøgnum. Í gjár kom tangabáturin á borði at taka olju frá okkum. Hann skal hava 36000 føt av hvalaolju heim við sær. Tað vera um 6000 tons.

**27. februar** gekk arbeiðið við sama lag. Bátarnir fáa nógvan hval. Nú eru vit farnir upp um 500 hvalir. "Am.1" - 64, "Am.2" - 72, "Am.3" - 109, "Am.4" - 101, "Am.5" - 57, "Am.6" - 55, "Am.7" - 14, "Am.8" - 27, tilsamans 501 hvalir.

**28. februar** var arbeitt við sama lag. Manningin á "Am.5" fór umborð á "Am.8", og manningin á "Am.8" fór umborð á "Am. 5". Teir skuldu sigla "Am. 5" til Cape Town, tí hann var óbrúkiligur til at skjóta hval við, skrúvan larmaði so illa. "Am.5" skal fylgjast við tangabátinum.

**1. mars** gekk arbeiðið sum vanligt á dekkinum alla náttina. Um dagin kl. 5 fór tangabáturin heim. "Am. 5" fylgdist við honum. Føðingardagurin hjá Martin Tórgarð (22 ár) endaði illa. Hann datt niður á dekkið av einum hvali og fekk ilt í knæið. Tað er gamal skaði, sum ofta vitjar aftur.



*Juleif Jacobsen var fýrbøtari á einum av hvalabátunum.*

**2. mars** gekk arbeiðið vánaliga alla náttina. Fyrst slitnaði ein toppjolla, og tað gingu tveir tímar, áðrenn hon var brúkilig aftur. Ein pottur kom í óordan í 1½ tíma, og hvalirnir vóru so rotnir, at teir skrædnaðu, tá vit skuldu kæntra teir. Tað var bara spikið tikið av teimum, so fór kroppurin yvir borð. Veðrið var vánaligt, væl av vindi og øðiliga kalt. Tað var gler á øllum dekkinum, so vit máttu ansa okkum, at vit ikki skuldu detta á reyvina.

**3. mars** var lítið arbeiði. Tríggir bláhvalir vóru flensaðir til kl. 7½. Tá fingu vit frí.

**4. mars** var arbeitt eins og dagin fyri. Tríggir hvalir vóru flensaðir og beindir fyri. Tað var lættligt arbeiði.

**5. mars** var arbeiði av tí mesta. Vit flensaðu 4 bláhvalir og arbeiddu spikið av 5. Kl. 4 um náttina var farið at sigla inn aftur í ísin, tí har skuldi vera meiri til av hvali. Veðrið er gott, men ógvuliga kalt.

**6. mars** var nógv av arbeiði alla náttina. Bátarnir høvdu allir ein og tveir hvalir, allir bláhvalir. Hetta seinasta samdøgrið var tað besta, vit hava havt av hvalaolju, væl yvir 1200 føt.

**7. mars** var arbeiðið nógv alla náttina. Um morgunin brotnaði ein pottur. Hann var for illa afturlatin, tá ið hann var fyltur av spiki. Tá hann var opnaður aftur, vendi hann botnin upp eftir. Veðrið er gott, men ísurin er av tí allar mesta, so langt vit kunnu síggja.

**8. mars** var lítið av arbeiði um náttina. Ein hvalur kom fyri miðjunátt og ein eftir miðjunátt. Teir vóru lidnir at arbeiði kl. 4. Tá fingu vit frí. Hvalurin flýtur nú, og vit sigla javnan uttan steðg aftan á trekkinum.

**Sunnudagin 9. mars** høvdu vit frí allan dagin. Á okkara náttarvakt kom bara ein hvalur. Hann var arbeiddur um dagin av dagvaktini. Allir bátarnir eru her, og teir siga seg síggja nógvan hval. Veðrið er gott, men ógvuliga kalt, nógvur ísur er, og sjógvurin er nýfrystur her uttan um okkum. 11 gradir kuldi.

**10. mars** var arbeiðið av tí mesta alla náttina. Allir bátarnir høvdu hval, og tað var einans bláhvalir. Fínt veður.

**11. mars** var heldur ringt veður. Nógvur vindur og øðiliga kalt. Alt frysti á dekkinum, so har var ikki stuttligt at arbeiða um náttina.

**12. mars** var arbeitt við sama lag alla náttina. Eftir midnátt kroysti ísurin seg so nær at skipinum, at tað sá út, sum vit ikki skuldu sleppa burtur úr honum aftur, men hann slitnaði sundur aftur, tá ið dagur var komin. Í nátt vóru aftur nakrir finnhvalir at flensa, so teir eru ikki allir rýmdir enn.

**13. mars** var arbeiðið sum vanligt alla náttina. Tá ið dagvaktin kom á dekkið, var eingin hvalur eftir at arbeiða. Í nátt var ógvuliga kalt. Glerpípur hingu allastaðni. Fyri samdøgrið í gjár fingu vit mesta olju, vit nakrantíð hava fingið í eitt samdøgur, 1272 føt.

**14. mars** var arbeiðið sum vanligt alla náttina. Tá dagvaktin kom á dekkið var eingin hvalur eftir. Veðrið var gott.

**15. mars** var arbeitt eins og náttina fyri. Tá ið dagur kom var einki eftir at gera. Gott veður men ógvuliga kalt.

Í gjár fóru vit upp um 600 hvalir. "Am.1" - 78, "Am.2" - 83, "Am.3" - 134, "Am.4" - 120, "Am.5" - 57, "Am.6"- 71, "Am.7"- 23, "Am.8" - 39, tilsamans 605 hvalir.

**Sunnudagin 16. mars** gekk arbeiðið av tí allarbesta alla náttina. Veðrið

*Framhald á næstu síðu*


*Hvalabátur inn við fongi.*


*Marius Kamban við spælið.*

er gott, men ógvuliga kalt. Í gjár skutu teir líka so nógv av finnhvali sum av bláhvali.

**17. mars** var arbeitt dúgliga alla náttina. Stilli og gott veður, móti morgni kavarok. Hvalurin er av tí mesta.


BURGERLIJKE STAAT VAN DEN HOUDER

ADRESSEN VAN DEN HOUDER

A.17123

*Blað úr sjófartsbókini hjá Martin Tórgarð. Niðast er fingraavtrykk, sum Mikkjal eisini umrøður í fyrsta partinum.*

### Polluks kemur til skaða

**18. mars** var arbeitt sum vant alla náttina. Hvalirnir vóru nógvir – bæði feitir og stórir. Í nátt var øgiliga kalt.

Johan við Stein kom til skaða í gjár. Klógvin, sum teir hála hvalin upp á dekkið við, smekkaði saman um bæði beinini á honum, so hann fall á dekkið. Bæði knøini vóru løstaði á honum. Doktarin helt tó, hann kom skjótt at ganga aftur á beinunum.

**19. mars** var arbeitt av tí mesta, vit nakrantíð hava arbeitt á afturdekkinum. Veðrið var gott og lýtt.

**20. mars** gekk arbeiðið spakuliga alla náttina. Veðrið var gott, men kalt.

**21. mars** var arbeitt sum vanligt. Kl. 7 morgun vóru vit lidnir, og tá fingu vit frí. Veðrið var av tí besta.

**22. mars** var lítið av arbeiði. Vit vóru lidnir kl. 3 um náttina. Tá fingu vit frí. Alla náttina ígjøgnum duttu ísstykkir niður á dekkið, og komu hesi frá bumveirum og øðrum línum úr flensujollunum uppi í erva. Alt var fryst í erva, men á dekkinum var heitt, og hvørja ferð dampurin kom upp frá dekkinum, so tiðnaði í erva og tað datt niður á dekkið.

**23. mars** var gott veður og nógv arbeiði. Ísurin er av tí mesta uttan um okkum.

**24. mars** var nógv av arbeiði alla náttina. Ísurin var so nógvur, at skipið sigldi á í heilum. Tá ið dagur kom, var ísurin heldur tynri. Kanónirnar frysta javnan, so bátarnir fáa ikki skotið.

**25. mars** var arbeiðið av tí mesta alla náttina. Kavarok av og á. Tá dagur kom, bleiv kavarok og hartil ógvuliga kalt. Í gjár fingu bátarnir 14 stórar bláhvalir.

**26. mars** var bert ein bláhvalur til okkum at arbeiða. Á miðjunátt vóru vit lidnir at reinsa dekkið. Tá fingu vit frí. Veðrið er gott, men stór og tung alda.

**27. mars** var nógv av arbeiði alla náttina. Ein hollendari Heinrick Hank fekk skaða í nátt. Tá teir skuldu skera kjálkabeinið leyst, slitnaði tað av og datt niður á lendarnar á honum. Tað var øgiliga kalt um náttina.

**28. mars** var ikki nógv av arbeiði hjá okkum. Kl. 4 vóru vit lidnir og fingu frí. Nú hava vit fingið yvir 700 hvalir. "Am.1" - 91, "Am.2" - 97, "Am.3" - 154, "Am.4" - 132, "Am.5"- 57, "Am.6" - 90, "Am.7" - 29, "Am.8" - 54, tilsamans 704 hvalir.

**29. mars** var lítið av arbeiði á dekkinum. 2 hvalir vóru flensaðir. Kl. 4 vóru vit lidnir og fingu frí. Veðrið er gott.

**Sunnunáttina 30. mars** var bert ein finnhvalur til at arbeiða hjá okkum. Hann var upptikin kl. 11½. Kl. 3 vóru vit lidnir við hann og fingu frí. "Am. 4" skeyt 2 finnhvalir fyri eitt skot.

Sunnudagin skutu bátarnir 19 hvalir.

**31. mars** var nógv av arbeiði alla náttina. Veðrið var gott, men so kalt, at rørini, sum gingu til slangurnar at spula dekk við, máttu tiðnast upp við kókandi vatni.

### Komið verður út í apríl

**1. apríl** var nógv av arbeiði alla náttina. Veðrið var av tí allarbesta. Stilli, klár luft og vakurt mánalýsi. Tað var hugtakandi, tá mánin skein á hvalabátarnar og ísstykkini ella kappdúgvurnar, sum sótu á sjónum. Tað hendir seg javnan, at fuglur setur seg á dekkið bæði um dagin og um náttina.

**2. apríl** var arbeitt alla náttina sum vanligt. Tá dagur kom, vóru bert tveir hvalir eftir at arbeiða. Í nátt var vindur.

**3. apríl** var einki av arbeiði um náttina. Á midnátt fingu vit frí. Vit hava nú fingið 747 hvalir.

**4. apríl** var bert ein hvalur til at arbeiða um náttina. Á miðjunátt vóru vit lidnir, og tá fingu vit frí. Fínasta veður.

**5. apríl** gekk arbeiðið spakuliga alla náttina. Veðrið var gott. Tá dagur kom, vóru bestu líkindi til at skjóta hval. Her, sum vit nú liggja, er eingin ísur at síggja.

**Páskaaftan 5. apríl** vóru 16 finnhvalir skotnir. Teir vóru feitir.

**6. apríl** gekk arbeiðið av tí besta alla náttina. Veðrið var av tí besta og nógvir hvalir og fittligir at arbeiða.

**7. apríl** var lítið av arbeiði um náttina. Á midnátt vóru vit lidnir og fingu frí. Hetta var okkara síðsta náttarvakt.

### Sigla heim

**8. apríl** byrjaðu vit at arbeiða á dekkinum. Kl. 8½ um morgunin. Summir skravaðu tann ringasta skittin av tí uppstandandi, áðrenn tað kundi verða vaskað, og hinir brutu dekkið upp, og blakaðu tað yvir borð. Kvøldið fyri byrjaðu hvalabátarnir at bunkra og rigga av. Teir vóru lidnir kl. 6 í dag. Ein bláhval høvdu teir til fríholt. Hann var tikin á dekkið og flensaður. Kroppurin var lagdur á dekkið at hava til fríholt á heimvegnum. Kl. 7 byrjaðu vit at sigla heim. Allir bummarnir vórðu lagdir niður í dag og avriggaðir. Kl. 8 kom telegram til okkum, at skipið hevði fingið loyvi at royna 10 dagar aftrat eftir hvali her suðuri. Hýrurin var ringur yvirhøvur.

**9. apríl** var hildið fram við at skrava og vaska omandeks. Kl. 10 var møti í messuni, har kaptajn Jespersen vildi hava fólkið at arbeiða uppá hval 10 dagar aftrat. Tað var einstemmiga sagt korta nei. Hann hevði spurt skipararnar á bátunum, um teir vildu skjóta longur. Allir søgdu ja uttan skiparin á "Am.2". Men tað bleiv av ongum, tá fólkið umborð á kókarínum ikki vildi arbeiða hvalirnar. So varð kósin sett móti Cape Town. Veðrið var av tí besta, men kalt.

**10. apríl** var gott veður. Arbeitt var við at reinsa skipið. Eg var sjúkur av rennandi avføringi.

**11. apríl** var arbeitt við sama lag. Alt tað ovasta lagið av plankum á dekkinum er brotið upp og blakað yvir borð. Mesta fólkið arbeiddi við at vaska og skrava. Kl. 2 komu "Am.1", "Am.2" og "Am.7" á borði at fáa sær olju og proviant. Tá teir vóru lidnir, sleptu teir tí rotna hvalinum, teir høvdu

Framhald á síðu 15


*Afturdekkið. Her verða hvalirnir flensaðir.*


*Her verður skorið fyri at flensa.*

Framhald av síðu 10

havt til fríholt. Hann luktaði illa. Kl. 6 var farið aftur at sigla.

**12. apríl** var arbeitt við sama lag á dekkinum. Seinnapartin fóru tveir mans av hvørjum kamari at vaska tey upp og niður.

**Sunnudagin 13. apríl** var frídagur umborð. Veðrið var vánaligt. Tung alda og nógvur vindur ímóti.

**14. apríl** var arbeitt við sama lag at reinsa skipið. Ódnarveður. Tað sigst, at eitt annað kókarí er 40 fjórðingar framman fyri okkum og hevur fínasta veður.

**15. apríl** var arbeitt allan dagin heldur spakuliga: Ringasta óveður. Nógvur vindur og stór alda við brotasjógvum ímillum. Skipið rullaði illani. Á fabrikkini boltaði ein stábul av tigilsteinum, og nógvar tunnur við olju slitu surringar. Tveir hollendarar fingu skaða á fabrikkini. Annar breyt armin, hin knústi nøsina. Tveir føroyingar fingu skaða í beinið. Annar var úr Havn. Hann æt Bjarki Skaale. Hin var úr Hósvík. Hann æt Napoleon Olsen (seinni stjóri á sjómansheiminum í Havn). Tá vit skuldu eta morgunmat inni í messuni, legðist



*Her verður spik koyrt í pottin á afturdekkinum. Spikið sær ikki so tjúkt út her, men tað kundi vera ein fót tjúkt.*

skipið so nógv á liðina, at alt, sum var á borðinum, fór á gólvið. Mesti parturin av steintoyinum fór í knas.

**16. apríl** var veðrið heldur betri. Mesta arbeiðið var at vaska og skrava skittin av skipinum. Afturi á reyv var gjørt klárt til hvalabátarnar at koma at bunkra.

**17. apríl** var arbeitt við sama lag at reinsa skipið. Nógvur vindur var allan dagin og av og á grovir kavaælingar.

**18. apríl** var arbeitt við sama lag allan dagin. Kl. 10 um morgunin kom "Am.6" á borðið at bunkra. Kl. 1 var hann liðugur og so var farið aftur at sigla. Hinir bátarnir vóru ongantíð støðgaðir á, so teir vera væl undan okkum í



*Nr. 2 frá vinstru er Martin Tórgarð, síðan Johan við Stein og Lars Davidsen. Johan við Stein, Pollux, var kendur sum boksari í Havnini. Her umborð gjørdi hann sær heldur ikki fyri skommum.*

Cape Town.

Aftur í Cape Town

**19. apríl** var fínasta veður. Arbeitt varð til kl. 3 um dagin, tá fingu vit frí. Klokkan 5 um dagin løgdu vit til kaiuna í Cape Town.

**20. apríl. Sunnudagin.** Mesti parturin av fólkinum gekk og tvassaði í landi allan dagin. Vit vóru nakrir fáir, sum arbeiddu allan dagin. Allir bátarnir skulu vera eftir í Cape Town. Vit tóku reserva propellir og gjørdu tær klárar at koyra umborð á bátarnar.

**21. apríl** var arbeitt uppá at taka útgerðina frá hvalabátunum umborð á "Willem Barendsz" og koyra reservapropellirnar umborð á hvalabátarnar og fortoya teir. Vit gjørdu fimm bátar lidnar.

**22. apríl** fingu allir føroyingarnir frí fyrrapartin til at fara í land. Hollendararnir arbeiddu umborð. Teir fingu frí seinnapartin. Tá skuldu føroyingar vera umborð aftur at arbeiða.

**23. apríl** var arbeitt við at gera skipið klárt at sigla. Kl. 6 var arbeiðið liðugt, og so var skipið loyst frá kaiuni. Sleiparar hálaðu tað út úr havnini og so var farið at sigla heim. Tveir føroyingar vóru eftir í Cape Town. Politiið var varskógvað um at senda menninar heim so skjótt, sum teir funnust aftur.

**24. apríl** var arbeitt við sama lag at reinsa skipið. Gott veður.

**25. apríl** gekk arbeiðið av tí besta allan dagin. Nú eru teir byrjaðir at mála skipið.

**26. apríl** var arbeitt til kl. 3 um dagin. Tá fingu vit frí. 9 pingvinir vera førdar heim við til tann zoologiska havan í Amsterdam. Tær eru vakrar. Vit hava fingið 779 hvalir. "Am.1" - 103, "Am.2" -106, "Am.3" - 173, "Am.4" - 143, "Am.5" - 57, "Am.6" - 107, "Am.7" - 32, "Am.8" - 64.

Afrikanarnir vóru avroknaðir eftir 74.000 føtum, og vit fáa óivað tað sama. Hartil tekur skipið 5 prosent fyri svinn. Vit kunnu so ikki hava niðanfyri 80.000 føt av olju.

**Sunnudagin 27. apríl** var ein frídagur fyri allar umborð. Veðrið var av tí besta.

**28. apríl** var arbeitt við sama lag at reinsa skipið.

**29. apríl** var meiri kraft sett á at mála skipið, umframt at summir vaskaðu og skravaðu. Eisini er komið væl á veg at reinsa spikpottarnar. Síðani vit fóru frá Cape Town hevur verið eitt fitt lot aftaná. Nú er tað minkað burtur í næstan einki.



*Á fordekkinum verður hvalurin sundurlimaður. Beinini verða skorin sundir við sag. Síðan verða tey koyrd í eina kvørn og síðan kókað.*



*Herlon í Kálvalíð, sum eigur sín part av hesi frásøgn, stendur aftanfyri. Tann fremri er helst ein canadiari.*



*Pingvinir vóru hildnar sum pisur.*



*Bjarki Skaale rokast. Hann var spikskerari.*



*F.v.: Mikkjal og Thomas Pauli, báðir úr Nólsoy. Mikkjal var framburðsmaður á nógvum økjum. Hann var við til at stovna arbeiðsmannafelag í Nólsoy í 1940 og gjørdist eisini formaður. Trupulleikin var bert tann, at fremsti arbeiðsgevari í bygdini var mammubeiggi hansara Edvard Hansen. Annars finst áhugavert tilfar um fyrstu árini hjá Arbeiðsmannafelagnum, sum vit kanska koma aftur til.*

Framhald á næstu síðu

**30. apríl** var arbeitt við sama lag allan dagin. Eitt frískt lot.

**1. mai** var frídagur. Tað var eftir tí norsku kontraktini, sum sigur, at 1. mai er fríheitsdagur arbeiðaranna, sum verður roknaður sum heiligdagur.

**2. mai** gekk arbeiðið við sama lagi sum vant um alt skipið.

**3. mai** var arbeitt til kl. 3.Tá fingu vit frí.Tá var so heitt um dagin, at lítið varð gjørt orsakað av hitanum. Um kvøldið fingu vit at vita, at um vit vóru nóg nógvir, skuldi reiðaríið senda okkum heim við flúgvimaskini. Nakrir ætlaðu sær heim yvir Danmark, men av tí at teir blivu ov fáir, endaði tað við, at allir føroyingarnir teknaðu seg fyri at fara heim við flúgvara.

**Sunnudagin 4. mai** var einki gjørt umborð. Gott veður. Ljósbíløt á dekkinum um kvøldið.

**5. mai** var frídagur umborð. 5. mai var hátíðardagur fyri hollendarar, tí tann dagin vóru teir frígjørdir frá týskum valdi. Um kvøldið gekk toran og luftin var heilt upplýst av ljósum. Í gjárkvøldið komu vit norður um linjuna.

**6. mai** gekk arbeiðið sum vanligt allan dagin.

**7. mai** var fínt veður og arbeiðið gekk av tí besta.

**8. mai** var arbeitt við sama lag um alt skipið.

**9. mai** gekk arbeiðið sum vant. Tað er væl av vindi ímóti.

**10. mai** var arbeitt til kl. 3 seinnapartin. Tá fingu vit frí. Nú sær skipið bæði reint og nossligt út. Ein pingvin er deyð.

**Sunnudagin 11. mai** var sum vanligt frídagur umborð.Veðrið var av tí besta.

### Koma inn í Kanarisku Oyggjarnar

**12. mai** kl. 8 um morgunin komu vit til Kanarisku oyggjarnar. Kl. 10 lógu vit inn fyri Las Palmas. Haðani kom ein av direktørunum fyri ""Willem Barendsz"-selskapið umborð og so var farið at sigla vegin fram til Hollands. Las Palmas er ein stórur og vakur býur at síggja frá sjónum av.

**13. mai** gekk arbeiðið sum vant. Gott veður við regni av og á.

**14. mai** var lítið gjørt allan dagin. Skipið er at kallað liðugt at reinsa og málað. Um kvøldið fingu vit at vita, at vit skuldu sendast heim yvir Danmark.

**15. mai** var heiligdagur. Ein frídagur við góðum veðri.

**16. mai** var lítið av arbeiði. Nú er liðugt at reinsa og mála skipið. Mesti partur av fólkinum var niðuri á fabrikkini og ruddaði.



*Á veg inn í Amsterdam togaðir av sleipibáti.*



*Ein fjøld av fólki tekur ímóti.*

**17. mai** var frídagur umborð. Orsøkin var, at tað er norski grundlógardagurin.

**Sunnudagin 18. mai** var einki arbeitt umborð á "Willem Barendsz". Um kvøldið sóu vit ljósini frá býunum inni á fronsku strondini. Vit sigldu tætt fram við ein stóran fýr.

**19. mai** var síðsti arbeiðsdagur umborð á "Willem Barendsz" fyri føroyingarnar. Gott veður. Tað eru nógv skip at síggja uttan um okkum.

### Koma til Hollands

**20. mai** kl. 7 seinnapartin sóu vit land av Hollandi. Kl. 8 sóu vit Rotterdam. Kl. 10 ankraðu vit uttan fyri Imuiden.

**21. mai** komu vit inn gjøgnum slúsurnar við Imuiden. Har vóru nógv túsund menniskju samlaði at síggja skipið.

Frá Imuiden líka inn til Amsterdam fekk "Willem Barendsz" fylgi av einum hópi av smábátum fullum av fólki. Harímillum var ein stór ferga full av fólki við hornorkestri umborð. Teir spældu allan vegin inn eftir. Tað sá út sum hesin dagur – "Willem Barendsz" kom inn til Amsterdam – varð hildin sum ein nationalur heiligdagur. Børn og vaksin – tað vóru nógv túsund – sóðust báðu megin á bakkanum allan vegin inn til Amsterdam. Allir hollendararnir fóru í land við pakk og sekk. Tað vóru bara føroyingar eftir umborð. Tað var noktað okkum landloyvi. Vápnað politi stóð við landgangin og ansaði eftir, at forboðið var hildið. Hýrurin var ringur yvirhøvur.

**22. mai** kl. 6 um morgunin skuldu vit fara í land av skipinum. Tríggir mans høvdu sníkt seg í land um náttina. Tveir komu umborð um morgunin, áðrenn vit fóru í land. Hin triði var eftir, tað var Johannis á Kák, sonur Karl á Kák. Kl. 7 komu vit gjøgnum tollin. Hagani fóru vit í bussi á stationina. Kl. 9½ fór tokið av stað. Tað fór gjøgnum fleiri býir á vegnum til markið harímillum Rotterdam. Kl. 2 komu vit til býin Bentheim, sum liggur innan fyri tað týska markið. Har kom tollvesinið og hugdi gjøgnum kuffertini og annað viðføri hjá okkum. Vit máttu skriva undir pappír, hvaðani vit komu, hvar vit skuldu o.s.fr. Kl. 4 fór tokið av stað víðari gjøgnum Týskland. So skjótt sum vit komu um markið, sóu vit merkini eftir, hvussu illani Týskland var bumbað undir krígnum. Bremen var heilt illani viðfarin, men Hamburg var ræðuligur at síggja. Har lá alt í sorli. Tað einasta, sum var heilt, var búgv yvir Elben ánna. Á midnátt komu vit til Kiel.

### Hugni í Keypmannahavn

**23. mai** um náttina koyrdu vit eftir brúnni yvir Kieler-kanalina og hagani komu vit til Flensburg, sum liggur við danska markið. Har komu vit gjøgnum tollin á sama máta sum við týska markið. Hagani fóru vit norður gjøgnum Jylland yvir Lítlabeltsbrúnna. Til Fyn gjøgnum Odense og víðari frá Fyn við ferguni til Sjælland. Vit koyrdu so víðari fram gjøgnum Roskilde til København. Kl. 9½ vóru vit á banagarðinum. Hagani koyrdu vit í bussi til hotell, har vit skuldu búgva til vit fingu skip til Føroyar. Eg kom at búgva á Hotel Norden. Á hotellinum skuldi eg fáa morgundrekka. Døgurða skuldu allir eta í K.F.U.M. Har skuldu vit eisini fáa ein matpakka við náttúrða í.Tað vísti seg at vera mest pálegg. Breyðið var tann minsti parturin. Um kvøldið vóru vit nakrir á eini restaurant – Skandia – og hugdu at, hvussu náttarlívið sá út í Kongens København.

**24. mai** vóru vit á hotellinum til tað var døgurðatíð. Aftaná spjaddust vit runt um býin. Kvøldið fyri høvdu fleiri føroyingar verið niðri í Nyhavnini og tatoverað seg.

**25. mai.** Sunnudagin vóru vit heima á hotellinum í friði. Tað var allar staðni yvirfylt av fólki henda dagin.

**26. mai** – annan hvítusunnudag gekk tað á sama máta. Um kvøldið vóru vit í Tivoli. Har slepst onga staðni fram at fyri fólki. Alt fólkið helt hvítusunnu í Tivoli.

**27. mai** var nakað av regni. Tað gjørdi, at tað varð sitið inni næstan allan dagin.

**28. mai** var mest gingið og malið rundan um hotellið, har sum vit búðu.

**29. mai** var heldur einki serligur. Um kvøldið vóru vit í Tivoli. Har hittu vit løgtingsmann og formann fyri Fólkaflokkin, bankastjóran Thorstein Petersen. Hann bjóðaði okkum fyrst eina øl og aftaná til døgurða við sær inni í Tivoli. Um dagin keypti eg mær eitt minni um Kristian tíggjunda. Tað var ein statua av marmor av konginum til hest.

**30. mai** vóru vit í friði á hotellinum.

**31. mai** kl. 7½ kom ein bussur á hotellið eftir okkum og koyrdi okkum oman á brúnna, har "Tjaldrið" lá. Kl. 10 fór "Tjaldrið" frá kaiuni á veg til Føroyar. Kl. 12½ passeraðu vit Kronborg, tá var loggið koyrt út. Veðrið var av tí allar besta.

**1. juni** var veðrið av tí besta. Kl. 7 3/4 steðgaði maskinan knappliga. Hon gekk heit, men hon fór í gongd aftur um eitt korter, so tað sinkaði einki.

**2. juni** var sjógvurin heldur tvassutur. Fleiri høvdu sjóverk. Á middegi passeraðu vit Shetlandsoyggjarnar, og kósin var so sett beint á Føroyar. Um kvøldið var sjógvurin slætnaður aftur og hýrurin var betur á øllum umborð.

**3. juni** kl. 6 legði Tjaldrið at kaiuni í Tórshavn. Har var væl av fólki at taka ímóti – harímillum fleiri nólsoyingar. Kl. 5 seinnapartin fóru vit við stórabáti til Nólsoyar og har var ferðin endað hjá okkum fyri hesa ferð.

"Rommel" kom til Havnar eftir okkum, men tá teir skuldu fara út aftur til Nólsoyar, brutu teir krumtapsaksilin, so teir noyddust at lata seg sleipa til Nólsoyar av stórabáti.



***Aftur í Keypmannahavn.***
*F.v. Aksel Tórgarð, beiggi Martin, sum las til prest í Keypmannahavn, Viljálmur Joensen, Johannes Heinesen, Martin Torgarð og Óli Kristian Jacobsen.*

Hvalabátarnir hava skotið hesar hvalir frá 17. desember 1946 til 8. apríl 1947:

"Am.1" – 55 bláhvalir, 45 finnhvalir, 2 spermar
"Am.2" – 53 bláhvalir, 52 finnhvalir, 0 spermar
"Am.3" – 79 bláhvalir, 84 finnhvalir, 8 spermar
"Am.4" – 79 bláhvalir, 59 finnhvalir, 2 spermar
"Am.5" – 30 bláhvalir, 26 finnhvalir, 0 spermar
"Am.6" – 49 bláhvalir, 48 finnhvalir, 2 spermar
"Am 7" – 15 bláhvalir, 18 finnhvalir, 1 spermar
"Am.8" – 41 bláhvalir, 22 finnhvalir, 0 spermar
401 bláhvalir, 354 finnhvalir, 15 spermar
Tilsamans 770 hvalir.

Hartil koma 9 hvalir, sum eru slitnaðir frá skipinum av óveðri og soknir ella horvnir í myrkri ella kavaroki. Tilsamans 779 hvalir. Í minsta lagi 80.000 føt.